# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Nýggjur búni til Eysturríkis-dystin

**Tað verður í spildurnýggjum búnum, at føroyska fótbóltslandsliðið fer undir nostalgisku uppgerðina móti Eysturríki**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sammett við liðið, sum var á vøllinum fyri 18 árum síðani, so er talan um spildurnýtt lið, sum fer á vøllin, tá Eysturríki vitjar.

Onkrir av spælarunum á landsliðnum í dag munnu neyvan minnast ta ferðina, tá Eysturríki mátti heim úr Landskrona við ongum, men týdningurin av sigrinum man tó vera teimum flestu kunnugur.

Tí er ikki sørt, at spenningurin í skiftingarrúminum er stórur, nú tað av álvara stundar til sjálvan landsdystin. Ein landsdystur, sum eisini verður spældur í spildurnýggjum búnum.

Fótbóltssambandið boðaði í gjár frá,a teir nú hava spildurnýggjar Pumatroyggjur til landsliðið. Troyggjurnar eru hampuliga líkar teimum, sum landsliðið hevur spælt í seinnu árini, men bulurin er nú hvítur, allur sum hann er. Áður hava føroysku litirnir annars eisini verið á sjálvum bulinum, men nú eru teir bert at síggja sum strípur á ermunum.

Troyggjurnar eru sergjørdar til føroyska landsliðið, og kunnu tí ikki keypast í vanligu ítróttarhandlunum, men á heimasíðuni, www.football.fo, er ein nethandil, har til ber at keypa sær troyggjuna. Eisini ber til at keypa sær atgongumerki til sjálvan dystin, sum altso verður leygardagin tann 11. oktober klokkan 16.




*Jákup á Borg er her avmyndaður í nýggja landsliðsbúnanum, sum fyri fyrstu ferð verður nýttur, tá Føroyar taka ímóti Eysturríki*

## Nýtt súkklulogo

Tórshavnar Súkklufelag hevur nú fingið sær nýtt búmerkið. Tað er Martin Joensen, sum hevur sniðgivið búmerkið, sum umframt ein kappsúkklara eisini ímyndar teir tríggjar bókstavirnar, TSF, sum eru stytting fyri Tórshavnar Súkklufelag.

## Fair Play dagur sunnudagin



Altjóða Fair Play dagur er sunnudagin, og hetta verður markerað, tá dystirnir í Formula-deildini verða spældir. Dystirnir eru tá NSÍ-EB/Streymur, Víkingur-HB og B36-B71, og verður Fair Playdagurin tá markeraður, við at gentur og dreingir ganga undan dómarum og spælarum á vøllin við einum Fair Play flaggi millum sín. Hartil verður altjóða orðingin um Fair Play hugburðin lisin upp undan dystarbyrjan.

## 3. deild spælir finalu leygardagin

B71 og B36 spældu seg seinasta leygardag í finaluna í 3. deild við hálvfinalusigrum á ávikavist Skála og AB.

Finalan millum liðini verður spæld á Argjum nú leygardagin, og verður tað Eiler Rasmussen, sum dømir dystin, ið byrjar klokkan 12.

Eisini verður dystur um bronsumerkini leygardagin. Hesin verður spældir á vøllinum við Margáir í Streymnesi klokkan 12.30, og verður tað Fríðin Ziskason, sum tá skal halda floytuni.

# 300 millíónir í bót

**Ógreiða kring eigaraviðurskiftini hjá Carlos Tevez og Javier Mascherano, tá hesir vórðu keyptir til West Ham, kostar helst London-felagnum um 300 millíónir**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var ein týðandi styrkur, sum West Ham fekk sær í vetrar-transfer vindeygan-um í 2006/07 útgávuni av ensku Premier League.

Við Carlos Tevez í álopinum og Javier Mascherano á miðvøllinum vann West Ham seg frá eini støðu sum vísur niðurflytari, soleiðis at teir við einum sigri á Manchester United á seinasta leidegi kundu bjarga tilveruni í Premier League. Avgerandi málið varð her skotið av Carlos Tevez.

Tað var tó ógreiða um ognarviðurskiftini viðvíkjandi spælarunum, sum partvíst vóru ogn hjá Media Sports Investment, og hetta kostaði tá West Ham eina bót upp á knappar 60 millíónir kr.

Hetta vóru tó smápengar í mun til tað, sum Sheffield United misti, tá felagið misti sín Premier League sess. Sheffield United hevði annars kravt, at West Ham varð dømt at missa stig sum avleiðing av handlinum, men hetta vann í fyrsta umfari ikki frama hjá enska fótbóltssambandinum.

Sheffield United kærdi úrskurðin við kravi um at fáa endurgjald fyri mistu Premier League-inntøkurnar, og nú – hálvt annað ár seinni – hevur felagið fingið viðhald í hesum. Nevndarformaðurin í felagnum, Kevin McCabe, sigur, at niðurflytingin kostaði í minsta lagi hálva miliard pund, men í so máta sleppur West Ham bíliga. Endurgjaldið, sum teir nú eru dømdir at rinda til the Blades, er upp á 300 millíónir krónur.